## Kanna valevni

Í Iran er ákæruvaldið farið undir at kanna, um tað er grundarlag fyri at reisa ákæru ímóti einum av teimum trimum forsetavalevnunum, sum hava funnist at valinum í summar. Tann almenna tíðindastovan Irna skrivar, at ákæruvaldið kannar, um tað ber til at stevna Mehdi Karrubi fyri útspilling. Hann hevur alment lagt løgreglumenn og starvsfólk í fongslunum fyri at hava neyðtikið ungfólk av báðum kynum, sum vórðu sett í varðhald, tá tey mótmæltu forsetavalinum.



## Fær ikki grið

Altjóða kríggsbrotsmannadómstólurin hevur havnað einari áheitan frá Radovan Karadzic um grið. Karadzic, sum var leiðari hjá serbunum í Bosnia undir borgarakrígnum har í nítiárunum, heldur uppá, at hann fekk lyfti um grið, um hann tók seg aftur. Hann sigur, at hann fekk lyftið frá amerikanska samráðingarleiðaranum Richard Holbrook í 1996, men tað hevur Holbrook avsannað. Radovan Karadzic, sum er ákærdur fyri kríggsbrotsverk, varð tikin í fjør, eftir at hann hevði fjalt seg í ellivu ár.

# Maiken blandar seg í tunnilskjakið á Álandi

**Fyrrverandi løgmansskrivarin Maiken Poulsen Englund er farin inn í tunnilskjakið á Álandi.**
**- Álendingar hugsa meiri um sín egna lumma, enn um hvat teir sum tjóð kunnu vinna við einum undirsjóvartunnli, sigur hon**

TUNNILSKJAK
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Maiken Poulsen Englund hevur búð á Álandi síðani 2006. Ì grein í Ålandstidningen undrar hon seg yvir mótstøðuna, sum er á Álandi móti einum undirsjóvartunnli, ið væntandi skal gerast millum Fasta Åland og oynna Føglø.

- Hugburðurin til samfelags-menning á Álandi og í Føroyum er ólíkur. Føroyingar eru offensivir og álendingar eru defensivir, og er hetta grundað á tjóðarhugburðin, skrivar hon millum annað.

- Meðan føroyingar fegnir vilja hava bæði fjallatunnlar og undirsjóvartunnlar, fara álendingar mannsterkir av húsi og savna undirskriftir fyri at steðga fyrsta tunnilinum, ið skal gerast.

- Eg blandi meg ikki beinleiðis uppí kjakið um tunnilin. Eg vil bara vísa á, hvat eg meini liggur aftanfyri tann hugburð, sum er á Álandi, sigur Maiken Poulsen Englund.

Hon skrivar víðari, at Áland ikki hevur líka sterkan tjóðarsamleika sum Føroyar, av tí at oyggjabólkurin liggur millum tvey stór lond og ikki hevur egið mál. Eisini hevur Áland fleiri ferðir verið í kríggi, og er hetta við til at skapa tann defensiva hugburðin.

- Á Álandi hugsa fólk nógv um at varðveita, og onki ringt um tað, men her eru 6.500 oyggjar, og tey ætla at gera ein tunnil til eina oyggj - hvussu nógv kann tað oyðileggja? spyr Maiken Poulsen Englund.

Eisini verður nógv kjakast um, hvat ein tunnil ger við umhvørvið.

### Bíligari enn væntað

Maiken Poulsen Englund vísir í síni grein á, at góður infrastrukturur er grundarlagið undir allari samfelagsmenning, og at ongi dømi eru um, at lond eru givin at byggja tunnlar, heldur tvørturímóti. Eisini vísir hon aftur, at tunnlar altíð gerast dýrari enn væntað.

- At kostnaðurin fyri eina tunnilsætlan altíð gerst dýrari er ikki rætt. Ein av undirsjóvartunlunum í Føroyum gjørdist bíligari enn væntað, og tey ferðandi gjørdust nógv fleiri, enn roknað var við, skrivar hon í greinini.

- Afturmeldingarnar til greinina hjá Maiken hava verið nógvar. Bæði positivar og negativar.

Ein skrivar inni á heimasíðuni hjá Ålandstidningen "Væl skrivað Maiken! Tað er bara at konstatera at Føroyar hava yvirhálað okkum á teimum flestu økjum, ikki minst á sjálvstýrisøkinum. Álendski hugburðurin: Vit vita, hvat vit hava, men ikki hvat vit fáa, er oyðileggjandi fyri samfelagið."

Ein annar skrivar at "Tíanverri Maiken - tú hevur ikki innsæð, at álendska náttúran er nógv viðbreknari enn tann føroyska. Ì Føroyum kunnu tey bara dumpa tons av gróti í Atlantshavið ... Nej tað er gott at vit hava fólk, ið kempa ímóti hesum morði, sum hetta er á okkara náttúru"

Maiken Poulsen Englund meinar, at føroyingar og



álendingar kunnu læra nógv av hvørjum øðrum.

- Álendingar eru í so varnir og føroyingar eru í so váðafýsnir, høvdu vit kunna møtst á hálvari leið, hevði tað nokk verið tað besta, sigur hon.

Hvussu tað gongur við tunnlinum á Álandi, er enn óvist. Maiken vil ikki siga, at hon er fyri øllum tunlum. Hon vil bara vísa á, hvussu ymisk fólk eru, og at ein tunnil faktiskt kann vera ein møguleiki og ikki ein forðing í einum samfelagi.

## Breiðbandið verður skjótari

**Nýggju breiðbandspakkarnir frá Føroya Tele eru dýrari hjá teimum smáu og bíligari hjá teimum stóru**

INTERNET
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ferðin á mest vanligu breiðbandshaldunum frá Føroya Tele, sum í dag eru 1 og 2 MB, verður frá 1. november tvífaldað upp í ávikavist 2 og 4 MB. Harumframt økist ferðin á haldinum, sum í dag er 4 MB, upp í 6 MB.

Prísurin á bíligastu haldunum hækkar í nýggja pakkanum við 15 krónum um mánaðin, men ferðin verður tvífalda úr einum upp í tvey MB.

Í dag fáast 2 MB flatrate fyri 450 krónur um mánaðin, men frá 1. november rinda hesir haldarar 470 krónur um mánaðin fyri 4 MB.

Prísurin fyri 4 MB er í dag 620 krónur um mánaðin, og hann verður óbroyttur, tá ferðin á hesum haldi økist upp í 6 MB. Ferðin á 8 MB haldinum verður óbroytt, men prísurin lækkar úr 985 kr til 825 kr um mánaðin.

Minstu haldini á 0,5 MB bera seg ikki fíggjarliga, og tey eru harafturat ov lítil til at nøkta framtíðar tørvin hjá flestu kundum. Tey vera tí ikki nýtekna framyvir, og mánaðargjaldið fyri hesi hækkar 30 krónur, skrivar Føroya Tele í tíðindaskrivi.